# Nýtt frá Eyðuni í Rex



Eyðun Nolsøe fyrireikar seg til Prix Føroyar tónleikakappingina við einari framførslu í Rex í Havn fríggjakvøldið. Hann fer at spæla egið tilfar – gott gamalt og spildurnýtt

Eitt av teimum kendastu nøvnunum, sum eru við í Prix Føroyar í ár, er Eyðun Nolsøe. Hann hevur sum tónleikari og sangskrivari útmerkað seg í føroyskum popptónleiki.

Fyrst var tað í Frændum, har hann sum blaðungur tónleikari slapp upp í part saman við beiggjum og vinmonnum. Hann fekk við tíðini ein alt størri leiklut í bólkinum og hevur skrivað onkrar av kendastu sangunum hjá bólkinum.

Eyðun Nolsøe hevur eisini royndt seg við eini soloútgávu, og hann arbeiddi í nøkur ár nógv saman við Terja Rasmussen, og teir góvu eisini eina fløgu út við nýggjum sangum.

## Nýggir sangir

Nú hevur Eyðun Nolsøe gjørt av, at hann vil verða við í Prix Føroyum, og leygarkvøldið um 10 dagar skal hann í eldin.

Men fyrst skal hann royna seg á pallinum í Rex í høvuðsstaðnum. Har fer hann fríggjakvøldið at spæla, og tað verða nógvir góðir sangir á skránni.

»Á, um vit«, »80'ini«, »Millum mussarnar«, »Dupultsong« og aðrir sangir, sum Frændur gjørdu landskendar, »Dansa«, »Sjalusi« og aðrir av soloútgávuni hjá honum, og so ikki minst onkrir nýggir sangir, sum skulu royna flogið, áðrenn teir verða spældir til Prix Føroyar.

## Góðar tónleikarar

Eyðun Nolsøe hevur allierað seg við góðum tónleikarum, nú hann fer við til Prixið.

Kim Hansen, James Olsen, Jens Marni Hansen og Johannus á Rógvu Joensen, sum nú í longri tíð hava spælt saman í bólkinum Showmenn, spæla undir hjá Eyðun, og ein betri smurda poppmaskinu kann Eyðun ikki ynskja sær at spæla sær á.

Tað verður spennandi at hoyra Eyðun Nolsøe til Prix Føroyar, men tey, sum ikki klára at bíða so leingi, hava møguleikan at hoyra hann á Rex fríggjakvøldið.








